Nýggjur oljurisi á landgrunninum:

# Hevur týðandi vitan við úr bretskum øki




*Á kortinum síggja vit m.a. hvar ChevronTexaco er virkið á Atlantsmótinum. Kelda Sosialurin og Statoil.*

**– Vit halda okkum síggja, at jarðfrøðin føroysku megin markið er tann sama sum í loyvi okkara bretsku megin markið, og tað er hetta við leggja okkum eftir at kanna víðari í eini nýggjari útbjóðing við Føroyar. Kolvetnisskipanin, sum tykist at vera til staðar her, gevur okkum gott mót. Møguleikin at finna olju føroysku megin markið skuldi verið eins góður sum tað er at finna olju í bretska økinum sigur Dave Lewis, stjóri hjá ChevronTexaco**

OLJUPRÁT
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eitt av heimsins størstu oljufeløgum, ChevronTexaco, hevur tikið fyrsta stigið at gerast partur av føroyska oljuævintýrinum. Felagið lat í farnu viku inn umsókn til Oljufyrisitingina í sambandi við annað útbjóðingarumfar. Felagið er eitt tað mest virkna á øllum Atlantsmótinum og vil nú eisini fáa føroyska landgrunnin við í sína arbeiðsætlan komandi árini. Tað var Dave Lewis, "Exploration Team Leader" fyri ChevronTexaco, sum handaði umsóknina, ið eftir øllum at døma er ein rúgvusmikið umsókn. Umframt ChevronTexaco, sum er fyristøðufelag, eru eisini Statoil, Dong og OMV við í umsóknini.

Enn er ikki alment, hvat ella hvørji øki, teigar, samtakið hevur søkt um, men tað er sannlíkt, at talan er um teigarnar heilt út til markið og áraka Rosebank oljufundið, sum somu felag hava gjørt beint hinumegin markið í summar. Tað er greitt, at eyndast tað samtakinum at fáa teigarnar føroysku megin eisini, so hevur tað fatur í einum samanhangandi øki, sum gongur frá føroyska landgrunninum tvørtur um markið og inn á bretskt umráði. Hetta kann, verður olja funnin báðumegin markið, koma at fáa stóran týdning fyri eina møguliga seinni útbygging, tí tað krevst eitt sera stórt ella tvey meðalstór fund fyri at kunna fara undir eina kostnaðarmikla útbygging her úti á djúpum vatni.

Dave Lewis frá ChevronTexaco er fegin um, at teirra felag nú er við í leitingini eftir kolvetni á føroyska landgrunninum. Hann vónar sjálvandi, at teirra umsókn fer at fáa eina góða viðgerð.

– Vit halda okkum síggja, at jarðfrøðin føroysku megin markið er tann sama sum í loyvi okkara bretsku megin markið, og tað er hetta við leggja okkum eftir at kanna víðari í eini nýggjari útbjóðing við Føroyar. Kolvetnisskipanin, sum tykist at vera til staðar her, gevur okkum gott mót. Møguleikin at finna olju føroysku megin markið skuldi verið eins góður sum tað er at finna olju í bretska økinum.

## Fokus á teigar har norðuri

Dave Lewis dylur ikki fyri, at størsti áhugin í dag bæði í bretskum og føroyskum øki eru teigarnir har norðuri. ChevronTexaco var eisini við til at bora brunn longur syðri, bretsku megin Gullhornið, og har gava boringin sama vánaliga úrslit sum brunnarnir í Gullhorninum. Nú verður hugt við nýggjum eygum og eftir nýggjum jarðfrøðiligum modellum.

Hóast bjartskygni er stórt, so er basaltið tó ein trupulleiki á føroyska økinum. Bretsku megin er einki basalt, og tí er lættari at gera tær neyðugu kanningarnar, áðrenn borað verður. Men ChevronTexaco sær tað kortini sum ein góðan møguleika at brúka vitanina og leitiúrslitini frá boring teirra í bretskum umráði við sær yvirum markið, tá kanningarnar kunnu byrja her. Tað kann tí væl vera, at prospektiviteturin tvs. møguleikin at gera fund er eins stórur báðumegin markið. Politiska markið millum londini merkir jú ikki umstøðurnar nýtast at vera ymiskar, hvørjumegin markið tú er.

Uppá fyrispurning nær felagið er klárt til at bora ein brunn á landgrunninum sigur Dave Lewis, at hann fær ikki sagt nakað um, hvat teirra arbeiðsskrá inniheldur, nú teir júst hava latið hana inn til myndugleikarnar. – Endamálið við øllum kanningum er sjálvandi at bora ein brunn, men vit fara hesi fyrstu árini at hyggja eftir tí óvissu og tí váða, sum er við at leita eftir kolvetni við Føroyar. Vit fara at brúka vitanina, sum vit longu hava fingið frá kanningum og boring okkara í bretskum øki og samskipa hana við okkara jarðfrøðiliga modell í Føroyum og vita um vit kunnu minka um váðan, sum so aftur kann enda við, at vit fara at bora.

## Síggja Føroyar sum part av Atlantsmóti

*– Nær gjørdu tit av at senda umsókn her?*

– Vit vistu um 2. útbjóðing og vóru tí við til at nominera teigar í fyrstu atløgu. Vit hava verið her áður so hetta var ikki nakað, sum kom so bráddliga. Og úrslitini av okkara kanningum vestan fyri Hetlandi í ár hava gjørt tað møguligt eisini at vera við í føroysku útbjóðingini.

Hóast ChevronTexaco hevur hevur skyldu til at bora nakran brunn vestan fyri Hetland næsta ár, so útilokar Dave Lewis ikki, at teir fara at søkja um loyvi at bora næsta ár. Hann vil ikki siga nakað nærri um tað, men í oljuvinnuni ljóðar, at felagið saman við sínum partnarum fer at bora ein avmarkingarbrunn í Rosebankfundinum. Tann brunnurin kann so aftur fáa sera stóran týdning fyri komandi virksemi okkara megin markið. Verður hann væleydnaður og Rosebankfundið kemur nærri eini útbygging, tá kann tá skunda undir kanningarnar hinumegin markið, um so er at samtakið fær tað ella tey øki, sum søkt er um.



*Dave Lewis, leitistjóri hjá ChevronTexaco við gott mót – nú felagið er í leitingini á landgruninum*

*Mynd Jan Müller*

Dave Lewis sigur víðari, at ChevronTexaco nú hyggur at føroyska økinum bæði út frá einum leitingarsjónarmiði og einum handilssjónarmiði. Vit kunnu vera hepnir ella ikki ella onkur annar verður tað. Neyðugt er við einum infrastrukturi til at kunna flyta olju og gass. Hann kann vera í Bretlandi ella í Føroyum. Men til tess at kunna tað, so mugu fleiri bólkar við í arbeiði tvs. at helst mugu fleiri fund gerast, sum so kunnu menna sama infrastruktur. Vit vilja vera við til at menna slíkan infrastruktur bæði í føroyskum og bretskum øki.

Tað kann so henda, at tað verða gjørdi fleiri minni fund heldur enn eitt heilt stórt. Tað kann so gera tað neyðugt at byggja út í felag. Tí er eisini gott at hava eitt bein hvør síni megin markið. Hetta verður serstakliga neyðugt, um gass verður funnið. Longu nú verður umhugsað at menna gassfelt og infrastruktur vestan fyri Hetland. Og verður gass funnið við Føroyar, so kann ein ímynda sær at tað eisini fer at brúka komandi infrastruktur og fara til somu marknaðir í Bretlandi sum gassið vestan fyri Hetland.

Dave Lewis viðgongur, at best er at finna olju, men út frá teirra kanningum og boringum vestan fyri Hetland, ber til at staðfesta, at verða fund gjørd, so verður eisini neyðugt at taka spurningum um gassið upp. – So vit síggja fyri okkum, at tað verður eisini neyðugt at taka upp, hvussu ein gassframtíð á øllum Atlantsmótinum verður handfarin.

ChevronTexaco er við í Lagganfeltinum vestan fyri Hetland, sum kann gerast katalysatorurin til ein gassinfrasstruktur og framleiðslu á Atlantsmótinum. Tað skal nógv gass til fyri at kunna fara undir slíka íløgu, og tí hevur tað eisini áhugan hjá ChevronTexaco at nýggj gassfelt verða funnin og tað er í m.a. eisini í hesum sambandi, at felagið eisini hyggur at tí føroyska økinum.

## Kappingarført

Dave Lewis sigur annars, at Føroyar eru partur av strategiini hjá ChevronTexaco at hyggja eftir og kanna Atlantsmótið, frá Noregi til økið millum Føroyar og Hetland, sum eitt av fleiri kanningarøkjum kring heimin, sum felagið raðfestir høgt. Norðuratlantshav er eitt av teimum.

Uppá fyrispurning um hann er kløkkur av, at fleiri av stóru oljufeløgunum, sum vóðru við í 1. Útbjóðing ikki eru við nú, sigur Dave Lewis, at hann vil treyðugt úttala seg um onnur feløg, men hann gitar, at ein orsøk kann vera, at feløgini framvegis hava kanningar og boringar at gera frá fyrstu runduni.

– Still early days sigur Dave Lewis, sum tó vísir á, at kunnu teir minka um váðan við nýggjum kanningum og skilja jarðfrøðina betri, so kann Atlantsmótið avgjørt kappast við onnur øki í heiminum, hvat framtíðar íløgum viðvíkur.

Dave Lewis leggur aftrat, at høgu oljuprísirnir hava onga ávirkan á teirra virksemi her. Teir arbeiða og tilrættaleggja uppá longri sikt, tá talan er um oljuprísir. Teir kunnu fara upp og niður.